# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Hugburðurin fer at bera langt



**HB venjarin var ikki nøgdur við spælið sunnudagin, men hann fegnast um, at spæligleðin og hugburðurin bóru sigurin við sær, og hann roknar avgjørt við, at hansara menn fara at spæla betri í Gundadali, enn teir gjørdu í Streymnesi**

HB
*Jóannes Hansen*

HB hevur vunnið steypakappingina fleiri ferðir enn øll hini feløgini tilsamans. Tískil er tað ikki nýggj støða fyri felagið, at flaggskipið í annaðkvøld verður annar parturin í endadystinum í kappingini um Løgmanssteypið.

- Vit spældu framúr væl týskvøldið í síðstu viku móti AB í Gundadali. Sunnudagin spældu vit ikki væl í Streymnesi. Eitt nú gekst ikki væl at fáa vongverjarnar við í uppbyggjandi spælið. Tá ið eg hyggi aftur á síðstu vikuna, so haldi eg, at tað gekk útyvir spælið sunnudagin, at vit týskvøldið brúktu óneyðuga nógva orku móti AB.

Óneyðuga?

- Ikki misskilja meg. Tað var neyðugt at arbeiða fyri sigrinum. Men tá ið dysturin var avgjørdur, kundu vit havt togað í bremsuna. Tað gjørdu vit ikki, tí alt gekk sum eitt spæl, og tað er hugaligt at undirhalda, tá ið tú kennir, at áskoðararnir eru so væl við, sigur HB venjarin, Albert Ellefsen.

Hetta er onnur ferðin, at hann er við HB í finalu. Fyrra ferðin var í 1998, tá ið Ion Geolgau hevði ábyrgdina, og Albert var hjálparvenjari. Ta ferðina vann HB 2-1 á KÍ.

Hvussu roknar tú við, at finalan fer at mynda seg?

- Tað valdast eitt nú, um annað liðið tíðliga megnar at fáa mál. Í Streymnesi sást, at talan er um tveir ymsar mátar at spæla uppá. EB/Streymur spælir skjótt fram til fremstu menninar, sum teir rokna nógv við. Hjá okkum eru tað fleiri spælarar við í álopunum, og tí er neyðugt hjá okkum at renna skjótt aftur, tá ið teir hava fingið fatur á bóltinum. At liðini spæla soleiðis ber við sær, at dystirnir ofta eru rættiliga undirhaldandi, heldur Albert Ellefsen.

Hvat var mest eyðsýnda styrkin hjá tykkum í Streymnesi?

- Tað var moralurin. Hugburðurin og spæligleðin lýstu av spælarunum, og tað verða fyrst og fremst hesar dygdirnar, sum skulu bera okkum fram til steypasigurin. Vit vita allir, at tað bara fer at bera til, um vit allir arbeiða alt, sum vit eru mentir, og tað fara vit at gera.

Í HB undirstrika teir aftur og aftur – á sama hátt sum teir gjørdu um hesa tíðina í fjør – at møguleikin fyri at vinna FM er burtur.

- Bæði hjá EB/Streymi og okkum er sigur í steypafinaluni síðsti møguleikin fyri at vinna eina kapping í ár. Tí verður talan um tætta og sera intensiva uppgerð.

Allir HB spælararnir eru tøkir. Jákup á Borg og Vagnur Mohr Mortensen vóru á næstbesta liðnum leygardagin. Jákup verður ivaleyst millum teir fyrstu ellivu. Um Vagnur verður í hópinum er meiri ivasamt, men tað kann hugsast, tí hann hevur áður víst, at hann er førur fyri rættuliga at seta dám á, um hann verður skiftur inn.

# Eiler hevur bíðað í tvey ár

**Óheftu menninir búgva allir í høvuðsstaðnum, meðan teir í dømingini standa at umboða feløgini í bygdunum, har teir eru uppvaksnir**

ÓHEFTU MENNINIR
*Jóannes Hansen*



*Eiler Rasmussen, dómari*

Tá ið ÍF og GÍ á Òlavsøku í 2005 spældu steypafinalu, var Birgir Sondum 23. maðurin á vøllinum.

Upprunaliga var ætlanin, at Eiler Rasmussen skuldi døma, men Eiler bar seg undan.

- Vit høvdu lagt frítíðarferð uttanlands til rættis, tá ið boðini komu fyri tveimum árum síðani. Tað harmaði meg, tí tað, at fáa litið finaluna til, man vera ynskidreymurin hjá øllum, sum fáast við døming, heldur Eiler Rasmussen.

Í ár var frítíð uttanlands eisini uppi í finalu fyrireikingunum:

- Eg var staddur í Svøríki í summarfrí, tá ið altjóða dómari okkara, Petur Reinert, sendi mær sms við tíðindunum um, at tað var gjørt av, at eg skuldi døma finaluna. Sjálvandi var eg fegin, tí í tvey ár hevði eg harmast um, at tað ikki lá fyri at døma á Òlavsøku í 2005.

Eiler hevur dømt í fremstu røð síðani í 2001.

- Dómaraprógvið leyk eg í 1997. Tey fyrstu árini vóru eg og Jens P. Brattalíð linjudómarar hjá Petur Erhard Kjærbo, sum dømdi. Hetta vardi í hálvt annað ár. So gavst Petur Erhard at døma, og Páll Augustinussen og eg vóru so linjuverjar hjá Jens Peturi, inntil hann fór til skips í 2001. Tá fóru Páll og eg at royna okkum, og síðani havi eg fingið loyvi at døma.

Linjudómararmikukvøldið verða Jens Albert Simonsen og Andreas Petur Hansen. Andreas Petur hevur verið í hesum fakinum eins leingi og Eiler, meðan Jens Albert man vera ein tann royndasti aktivi í føroysku dómaraverðini. Hann er altjóða linjuverji og hevur í ár verið uttanlands og dømt saman við Peturi Reinert.

Merkisvert er tað, at allir tríggir, sum mikukvøldið hava ábyrgdina av, at alt gongur fyri seg sambært ásetingunum, búgva í høvuðsstaðnum, meðan teir í FSF yvirlitinum standa at umboða bygdafeløg.

Eiler Rasmussen og Andreas Petur Hansen eru báðir ættaðir av Skála, og Skála Ítróttarfelag stendur at varða av teimum sum dómarar. Jens Albert Simonsen er ættaður úr Miðvági, og í FSF yvirlitinum stendur hann at vera knýttur at MB.

- Eg búgvi á Argjum. Men eg havi ongantíð havt tilknýti til annað ítróttarfelag enn tað á Skála, og tað havi eg heldur ongar ætlanir um, sigur Eiler Rasmussen.

Fjórði dómari verður Lars Müller. Hann arbeiðir í Havn. Felagið, sum hann sambært FSF er knýttur at, er Royn í Hvalba, har hann býr, tá ið hann ikki er til arbeiðis.

Hvussu fyrireikar tú teg til hesa uppgávuna?

- Fyri at vera førur fyri at døma er neyðugt at vera í góðari venjing. Eftir ársskiftið renni eg fleiri ferðir um vikuna samstundis sum vit dómarar, sum búgva í høvuðsstaðnum, spæla innandura fótbólt saman eina ferð um vikuna. Meðan vit døma, renni eg tríggjar ferðir og spæli innandura eina ferð um vikuna.

Hvussu fyrireikar tú teg mikudagin?

- Sum til allar aðrar dystir. Tó er tað soleiðis, at tá ið talan er um vanligan arbeiðsdag, og dysturin er ásettur at byrja klokkan 18, so fari eg úr arbeiði eitt sindur, áðrenn eg plagi at fara. Eg veit, hvat fyri slag av fótbólti hesi bæði liðini spæla, og tað er ikki frítt, at man spælir ymsar støður, sum kunnu uppstanda, ígjøgnum í høvdinum. Tað ræður um at vera likamliga og sinniliga klárur.